## Nýggju skipini eita Lómur og Blikur



Nýggju bingjuskipini hjá Faroe Ship eita »Lómur« og »Blikur«. Hetta boðar Faroe Ship frá í tíðindaskrivi í morgun. »Lómur« og »Blikur« koma saman við »Godafoss« og »Dettifoss« at røkja nýggju siglingarætlanina hjá Faroe Ship í 2008. Nýggi »Lómur« og »Blikur« fara at røkja siglingina til og frá Tórshavn, Immingham, Århus, Goteborg, Fredrikstad, Reykjavík og Reyðarfirði. »Godafoss« og »Dettifoss« fara at røkja siglingina til og frá Tórshavn, Rotterdam, Hamburg, Århus, Reykjavík, Grundartanga. Gamli »Blikur« fer at røkja siglingina millum Føroyar og Scrabster til annað skip kemur í februar.

## Danin eigur 725.000 kr. í meðal

Business-Line skrivar í morgun, at nettoágnin hjá dønum er vaksin úr 1990 milliardum krónum í 2002 til 3968 milliardir krónur í 2007. Hesi tøl stava frá eini kanning hjá Danske Bank, og umrokna merkir tað, at hvør dani eigur eina nettoogn upp á 725.000 krónur í meðal. Ríkast eru tey, sum eiga bústað á Fredriksberg, har meðalognin er 5,8 milliónir krónur fyri hvørja sethúsaogn, meðan tey ið eiga hús á Morsø ella í Thisted liggja niðast á listanum, har meðalognin fyri hvørja sethúsaogn er 1,1 millión krónur. Sambært danska blaðnum Børsen er virði á donskum fastognum hækkað við 86% seinastu fimm árini.

# vørvisvernd í álvara



*- Vit hava yvirfyri myndugleikunum víst á, at skipini eru soleiðis innrættað, at tað nærum er ógjørligt at fyribyrgja yvirbunkring. Tí ynskja vit, at krøv verða sett skipunum um, at øll yvirflot og luftrør skulu savnast í ein tanga, sigur Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

ingar í framtíðini kunnu fáa stóra ávirkan á okkara fiskivinnu.

- Sjálvt serfrøðingar vita ikki, hvørjar avleiðingarnar kunnu fara at verða, men teir tykjast samdir um, at broytingar í náttúruni kunnu fáa katastrofalar avleiðingar fyri núverandi fiskiskap. Vit fáa neyvan gjørt nakað fyri at forða hesum.

Eyðstein segði, at tann fiskiskapur, sum vit kenna í dag, kann broytast fullkomiliga, tí fiskastovnar saktans kunnu fara at broyta útbreiðslu- og ferðingarmynstur.

- Ein avleiðing kann gerast, at grundarlagið undir avtalunum millum lond um fiskiskap kann detta burtur. Skiparar eru teir fyrstu, sum gerast varugir við óvanlig veðurskifti á sjónum.

Eyðstein Djurhuus helt, at granskarar eiga at brúka hesa servitan, tá ið teir skulu meta um avleiðingar av veðurlagsbroytingum.

## Frí umsetiligheit til útvald

**FSN**

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á aðalfundi í Føroya Skipara-og Navigatørfelag nam formaðurin, Eyðstein Djurhuus, eisini við lógina um vinnuligan fiskiskap og handilin við skipum og fiskiloyvum.

- Nógv teir flestu limirnir hjá okkum eru við fiskiskipum, og tí kunnu broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap ávirka okkara limir nógv.

Hann vísti á, at vit seinastu árini hava sæð ein veksandi handil við skipum og fiskiloyvum.

- Tað tykist sum einki mark er fyri, hvussu kostnaðarmikil loyvini kunnu verða. Felagið ber tí ótta fyri, at rokningin fyrr ella seinni endar hjá skipara og manning.

Tá ið lógin um vinnuligan fiskiskap enn einaferð skuldi dagførast, var FSN boðið til fundar hjá løgtingsins vinnunevnd.

- Vit vístu á, at tað hevur verið vanligt, at skiparar og stýrimenn eina part í skipum, teir sigla við, men við hesi gongd er tað nærum ómøguligt hjá einstakum persónum at gerast munandi partaeigari í fiskiskipi. Fría umsetiligheitin er vorðin avmarkað til ein útvaldan skara av peningasterkum íløgufeløgum, bankum og útlendskum áhugamálum.

Hann segði, at felagið ávarðar staðiliga móti hesi gongd.

- Vit mæltu tí til, at fiskirættindi á ein ella annan hátt eiga at vera tíðaravmarkað. Orsøkin til hesa spekulatión kemur heilt víst av, at fiskirættindi verða uppfatað sum varandi ogn. Sambært nýggju lógini eru tey tíðaravmarkað, men verandi loyvishavarar kunnu fáa loyvini endurnýggjað, um einki talar ímóti, segði Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag.

# Strævið at fundast við almennar nevndir

**- Tað er sera strævið at fundast við almennar nevndir. Tú situr har einsamallur millum eina fjøld av almennum kraddarum, sigur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag**

**FF**

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað vóru ikki mjúk orð, ið formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, legði fyri dagin, tá hann á landsfundi felagsins fríggjadagin greiddi frá, hvussu tað er at fundast við almennar nevndir, sum hann tók til.

- Tað eru sera nógvir fundir, og fyri tað mesta er tað formaðurin, sum er á fundi, men eisini fólkið á skrivstovuni og nevndarlimir felagsins. Fundirnir eru fyri tað mesta við aðalstýri og løgtingsnevndir, men eisini við bankar, pensjónsgrunnar, tryggingarfeløg og onnur.

Jan duldi ikki fyri, at tað er sera strævið at fundast við almennar nevndir.

- Tú situr har einsamallur millum eina fjøld av kraddarum, sum einans hava eitt endamál - at súgva sum mest til sín, sum okkara heiðurligu fiskimenn forvinna.

Hann legði aftrat, at hesar nevndir leggja ikki fingrarnar ímillum, men skuldseta fiskimannin fyri bæði líkt og ólíkt.

- Tað er lítið hugaligt at vita sær, at fiskimenn, sum vit vita vilja alt tað besta og lata nógv tann størsta partin av hýruni til onnur enn seg sjálvan, fáa sovorðna tøkk.

Jan segði, at felagið í nógv ár hevur roynt at hildið tørn, og hetta hevur eydnast á nøkrum økjum.

- Nú er so tíðin komin, tá vit fara at krevja okkara rætt. Vit fara ikki at helma í, fyrr enn alt er komið undir land. Føroya fólk fer at ásanna, at líður fiskimaðurin, so líður Føroya fólk við. Tað er hetta, vit skulu til at prógva, segði Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag.



*- Føroya fólk fer at ásanna, at líður fiskimaðurin, so líður Føroya fólk við, segði Jan Højgaard á landsfundi fríggjadagin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*